Bretar og føroyingar fyrireika leitiútbjóðing á Atlantsmótinum

Jan Müller

03.11.2015 - 09:49

Oljan.fo

Føroyingar og bretar fyrireika nú nýggja oljuleiting báðumegin markið í økinum millum Føroyar og Hetland, eisini kent sum Atlantsmótið. Meðan landsstýrið hevur sett út í kortið ta

4. útbjóðingina til leiting at vera í 2017, so arbeiða bretskir myndugleikar nú við 29. útbjóðingini at vera í 2016.

Tað er greitt, at fyri Bretland og vinnulívið har stendur nógv uppá spæl, nú lækkandi oljuprísur er um at skeikla ta risastóru oljuvinnuna. Fyri at tann so týdningarmikla oljuleitingin ikki skal steðga heilt upp, hevur bretska stjórnin tikið tað heldur óvanliga stigið at fara djúpt niður í landskassan eftir 200 mill. kr. at brúka til eina umfevnandi seismiska kanning, sum so aftur skal vera grundarlagið undir nýggjari oljuleiting í komandi árum. Tann leitingin skal so vónandi varðveita og helst eisini leggja til týðandi oljuídnaðin.

Nú oljuprísurin er lækkaður nógv seinasta árið, umframt at fleiri av oljufeløgunum siga upp fólki og leggja útbyggingarætlanir á hillina, eru bretskir oljumyndugleikar farnir at rudda slóð fyri nýggjari leiting eftir olju og gassi, og her m.a. í sokallaðum útjaðaraøkjum so sum á Atlantsmótinum, økinum millum Hetland og Føroyar.

Herfyri setti stjórnin so 200 mill. kr. av til umfatandi seismiskar kanningar á einum rættiliga stórum øki úr Írlandi til Norskahavið og síðani eisini í Norðsjónum. Felagið Western Geco, sum eisini stóð fyri fyrstu veruligu seismisku kanningunum í Føroyum í 1994, er júst liðugt við at skjóta seismikkin, sum nú verður tulkaður. Ætlanin er at brúka úrslitið av seismikkinum í sambandi við komandi 29. útbjóðing. Oljufeløg fáa seismiska tilfarið ókeypis.

Tað er nýggi stovnurin OGA, ”The Oil and Gas Authority”, sum stendur fyri arbeiðinum. Seismikkur er eisini skotin allan vegin framvið føroyska markinum, soleiðis at tað nú fáast nýggir upplýsingar um undirgrundina tætt upp at føroyska landgrunninum. Talan er um sera framkomnan seismikk, ið fevnir um eitt øki, sum er størri enn alt Bretland. Schlumberger, sum eigur Western Geco, sigur, at tey brúka ta nýggjastu tøknina at tulka seismikkin við og rokna harvið at kunna síggja nógv betur gjøgnum undirgrundina enn higartil.

Ein orsøkin til at myndugleikarnir nú sjálvir eru farnir inn at fíggja seismikk er tann, at leitivirksemið seinastu árini er nógv minkað og er vónin tann, at henda kanningin kann vera við til at skunda undir oljufeløgini at leita meira. Bara eitt sera avmarkað tal av brunnum er borað seinastu árini.

Tað var í mars mánað, at George Osborne fíggjarmálaráðharri segði frá, at stjórnin hevði gjørt av at fíggja nýggjar seismiskar verkætlanir fyri betur at kunna kanna møguleikarnar, hvussu nógv olja og gass goymir seg í undirgrundini. Hetta er partur av eini størri játtan uppá 1, 3 mia. kr., ið hevur til endamál at stuðla upp undir nýggjar íløgur í Bretlandi.

Stjórin í nýggja almenna og privata stovninum, OGA, Gunther Newcome, var sera fegin um avgerðina og enn meira fegin, nú tað hevur eydnast at skjóta seismikkin uttan størri trupulleikar. Nú verður seismikkurin tulkaður og eftir tað latin til oljufeløg, sum kunnu hugsast at vilja leita í bretskum øki komandi vár.

Nýggja verkætlanin er eisini ein roynd at vita, hvussu nýggi stovnurin OGA, sum er eitt alment-privat samarbeiði, ið skal stuðla uppundir oljuleiting og -framleiðslu í Bretlandi, kann virka vinnuni til gagns. OGA stendur fyri at fyrireika komandi 29. leitiumfarið, sum verður kunngjørt í 2016. Hetta fevnir so eisini um øki nær føroyska markinum. Ein kann siga, at

henda jaliga tilgongdin í bretskum øki kann eisini vera ein møguligur hjálp hjá føroyskum myndugleikum eisini, sum í løtuni arbeiða við at fyrireika tí 4. oljuútbjóðingina við Føroyar. Hon er sett til at vera í 2017. Nýggj vitan um undirgrundina vestan fyri Hetland kann møguliga eisini vera við til at geva okkum í Føroyum og oljufeløgum, sum hava loyvi her og sum kunnu hugsast at vísa áhuga fyri okkara komandi útbjóðing, týðandi upplýsingar.

Oonagh Werngren, frá ”Oil and Gas UK”, sum er systurfelag hjá tí føroyska FOÍB, sigur við Oil Voice hjá Press & Journal, at væleydnaða seismikkskjótingin eru sera góð tíðindi fyri oljuvinnuna. At myndugleikarnir saman við vinnunu á henda hátt kunnu fáa til vega týðandi seismiskt tilfar at brúka í leitingini er eitt dømi um tann týdning nýggi stovnurin OGA kann fáa fyri alt oljuumhvørvið í Bretlandi. At til ber at fáa til vega nýggj data, sum oljufeløgini kunnu fáa ókeypis, er eitt sera gott stig at taka. Hetta tryggjar, at bæði vinnan og granskingarstovnar kunnu fáa tilfar til vega at tulka víðari sjálvi og fer hetta í síðsta enda at ganga Bretlandi og oljuvinnuni.

Uppgávan hjá OGA er eisini at fáa oljuvinnuna og tað almenna til at samstarva meira, soleiðis at vinnan verður meira effektiv. Nýggju tiltøkini byggja so eisini á góð ráð í tveimum frágreiðingum, sum eru gjørdar nettupp um, hvussu vinnan fær meira burtur úr fyri minni. Onnur frágreiðingin er gjørd av Wood Group og hin av OGA. Í dag eru 375.000 fólk knýtt at oljuvinnuni í Bretlandi, sum stendur fyri einum samlaðum umsetningi uppá 350 mia. kr.

Uttan at gera samanberingar við Føroyar og tilgongdina her, so er greitt, at umrødda stóra seimsikkætlanin kann koma væl við hjá føroyskum myndugleikum, sum ynskja at varpa ljós á framtíðar leiting her. Tí fleiri av feløgunum, sum arbeiða vestan fyri Hetland, eru og hava verið tey somu, sum eisini hava verið við í leitingini her. Ein kann spyrja, um tulking av nýggjum seismiskum data heilt upp at føroyska markinum, kann fáa ávirkan á áhugan hjá oljufeløgunum einaferð í framtíðini eisini at vilja fara hinumegin markið at leita eftir olju og gassi.Hetta hava vit sæð áður. Men hetta kann so eisini gerast ein avbjóðing fyri leiting her, at tað verður ein kapping um at fáa oljufeløgini at bora í antin bretskum ella føroyskum øki. Tá kunnu so eisini treytirnar fyri at bora og framleiða eisini koma at hava týdning. Tað vil so tíðin vísa. Hyggja vit eftir lutvíst stuttu føroysku oljuleitisøguni, so hava tað eisini verið leiting og fund hinumegin markið, sum hava skapt áhuga fyri tí føroyska økinum eisini.